**Kári P. Højgaard**
**Jógvan Skorheim**
**vegna Sjálvstýri**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 5/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(Broyta áseting um gildistíð fyri koyrikort til tey eldru)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(Broyta áseting um gildistíð fyri koyrikort til tey eldru)

**§ 1**

Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógar-kunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 6. juni 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1** § 18 b, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3*. Koyrikort, sum verður útgivið til umsøkjarar, sum hava fylt 75 ár ella meira til koyrikortsflokk 1, verður útgivið við gildi í 5 ár. Tó setir landsstýrismaðurin reglur um gildistíðina hjá koyrikortum, ið eru latin persónum, sum hava fylt 73 ár, men ikki 75 ár.
Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, har skipað verður fyri, at um umstøður eru til tess, skal koyrikort hava styttri gildistíð enn ásett er í stk. 1."

**2.** § 64 k, stk. 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:
"7) Fyri endurnýggjan av koyrikort hjá umsøkjarum, sum hava fylt 75 ár, verður onki goldið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

**Almennar viðmerkingar**
Farna árið gjørdi danska stjórnin greitt, at teir ætlaðu at avtaka aldurskravið til eldri borgarar, við endurnýggjan av koyrikorti.

Samtykta lógin, ið varð lýst at galda í Danmark frá 1. juli 2017, hevði sum vanligt er ásetingina: Henda lóg ikki er galdandi fyri Føroyar og Grønland.

Í hesum sambandi varð fyrispurningur nr. 48/2017, eftir tingskipanini grein 52a, settur Henriki Old, landsstýrismanni í samferðslumálum.

Spurt varð um altjóða góðkenning av føroyska koyrikortinum.

Um ætlanin var at gera somu broytingar fyri endurnýggjan av koyrikortinum, sum danir hava gjørt við avtøku av aldurslofti, læknakanning og 15 ára gildistíð.

Somuleiðis varð landsstýrismaðurin spurdur, um hann helt, at tvungna kanningin av eldru borgarunum til endurnýggjan av koyrikorti og kostnaðurin av hesi var rímiligur, tá Danmark og fleiri av grannalondunum eru farin frá hesi skipan.

Svarið frá landsstýrismanninum er greitt. Hann fer ikki at avtaka aldursmarkið, og grundgevingarnar eru m.a.:

"Í almennu viðmerkingunum til donsku lógarbroytingina, verður m.a. sagt: *Efter en samlet afvejning af forskellige modstridende hensyn anbefalede Justitsministeriet, Sundhedsstyrelsen og Rigspolitiet, at der fortsat burde være en fast aldersgrænse.*

*Arbejdsgruppen fandt ikke nærmere lægeligt videnskabeligt belæg for at pege på en bestemt ny aldersgrænse. Beslutningen om fastsættelse af aldersgrænsen måtte således bero på bredere, herunder i høj grad politiske, overvejelser med afsæt i de forskellige modstridende hensyn.*

Í Svøríki er onki ovara mark fyri ta vanligu gildistíðina, sum er 10 ár, men endurnýggjan av koyrikortinum er treytað av, at fylt verður út ein eginváttan um heilsu.

Í Noregi eru koyrikort til akfør í flokki 1 galdandi í 15 ár, til handhavin hevur fylt 75 ár. Endurnýggjan eftir 75 ár er treytað av nýggjari læknaváttan. Hareftir sum 78 ára gamal og eftir tað 2. hvørt ár.

Í Finnlandi er gildistíðin hjá koyrikortum vanliga 15 ár, tó í mesta lagi til handhavin hevur fylt 70 ár. Endurnýggjan eftir tað er treytað av nýggjari læknaváttan 5. hvørt ár.

Í Bretlandi eru koyrikort til akfør í flokki 1 galdandi í 10 ár til handhavin hevur fylt 70 ár, og eftir hetta er gildistíðin 3 ár. Onki krav um læknakanning, men handhavin skal útfylla eina eginváttan um heilsu.

Lond sum Týskland, Frakland og Eysturríki hava ikki nakað ovara mark fyri vanligu gildistíðina, og sostatt eru ongi serlig krøv til koyrikort hjá eldri."

Samanbera vit okkum við omanfyri nevndu londini, hava Føroyar kravmiklastu ásetingarnar fyri endurnýggjan av koyrikorti hjá eldri bilførarum.

Í Danmark varð mett, at screeningin av koyriførleikunum hjá teimum eldru bygdi á skeivt grundarlag, at tey eldru skuldu verða ein størri vandi í ferðsluni, tí tey við aldrinum sløvast mentalt og fysiskt. Tí tók stjórnin stig til at broyta lógina, sum avtekur aldurskravið fyri koyrikort til eldri.

Ferðslu- bygnings- og íbúðarmálaráðharrin, Ole Birk Olsen, (LA), boðaði frá: *Der er ikke noget videnskabeligt belæg for, at ældre er til større fare i trafikken end andre aldersgrupper. Faktiskt viser undersøgelser af uheldsrisiko, at ældre er gode til at overholde fartgrænser, og at de har en lav risikovillighed. Samtidig har det meget stor betydning for de ældres mobilitet og livsglæde, at de på egen hånd kan komme fra A til B og handle, eller besøge familie og venner. Derfor vil vi i*

*regeringen nu gøre op med et forældet regeltyranni og fjerne et alderskrav, som er til mere skade end gavn.*

*Ud over en fjernelse af alderskravet lægger lovforslaget op til at skærpe anvendelsen af det lægelige kørselsforbud og indberetningspligt i tilfælde af, at en ældre er til fare for sig selv og andre.*

Eisini eldramálaráðharrin, Thyra Frank, frøddist um, at við lógaruppskotinum bleiv størri álit víst okkara eldru borgarum. Fólk liva longur í dag og eru betur fyri heilsuliga enn fyrr, hóast høgan aldur.

Upplýst varð eisini sambært kanningum, at lond uttan aldursscreening ikki hava munandi fleiri ferðsluvanlukkur millum tey eldru enn londini, sum hava hesar aldurscreeningar.

Við at avtaka kravið um læknakanning umframt gjald fyri endurnýggjan av koyrikorti v.m. sparir 75 ára gamli pensjónisturin 600 - 700 kr. árliga.

Tað er bólkurin av ungum bilførarum í aldrinum 18 til 24 ár, sum er í hægsta vandabólkinum at verða partur av ferðsluvanlukku. Hetta sæst eisini aftur á bilútleigan, har tað er vanligt, at bilførarar í hesum aldursbólki rinda eitt hægri gjald enn onnur.

Koyrikortið, sum í dag verður útskrivað til 18 ára gamlan bilførara, ið hevur staðið koyriroyndina, er galdandi í 15 ár ella til 75 ára aldur.

Spurningurin er, um vit ikki við lógarkravi um álagda árliga læknakanning av bilførarum í ávísum aldursbólki fremja diskriminatión/mannamun, um tað ikki við nágreinaðum tølum av óhappum kann prógvast, at fólk í hesum aldursbólki eru vandamiklari í ferðsluni enn onnur.

Allir bilførarar hava sjálvsábyrgd og eiga at leita sær til lækna, um ein hevur mistanka um skerdan førleika. Læknar og avvarðandi hava eisini skyldur.

Endurnýggjan av koyrikortinum kann verða treytað av, at fylt verður út ein eginváttan um heilsu.

Lógarbroytingin sum uppskotsstillarin vegna Sjálvstýri legði fyri Løgtingið í farnu tingsetu (lm.nr. 96/2017), har aldursmarkið til vanligt koyrikort bleiv avtikið javnbjóðis teimum broytingunum, gjørdar vórðu av Fólkatinginum í 2017, fekk sum kunnugt ikki undirtøku.

Undir viðgerðini tóktist tó semja vera um, at tað var órímiligt at krevja, at allir bilførarar eftir 79 ára aldur árliga skulu endurnýggja koyrikortið við læknakanning og tí kostnaði, hetta hevur við sær. Víst varð á møguleikan, at tað frameftir kundi verið Heilsutrygd, ið rindaði fyri læknakanningina.

Harafturat hevur Henrik Old, landstýrismaður í samferðslumálum, boðað frá, at hann er sinnaður at strika gjaldið fyri útflýggjan av koyrikortum til pensjónistar.

Siðvenja hevur verið, at vit í mestan mun fylgja donsku ferðslulógini og ásetingum, men hetta uppskotið er minni radikalt. Tí verður uppskotið um, at aldursmarkið til endurnýggjan av koyrikortinum nú skal vera 5. hvørt ár, lagt fyri Løgtingið til støðutakan.

Uppskotið er lagt fram saman við løgtingsmáli nr. 6/2018. Víst verður tískil eisini til tað málið, sum er ein broyting í løgtingslóg um Heilsutrygd.

**Serligar viðmerkingar**
**Til § 1**
Til nr. 1: Gildistíðin fyri koyrikort hjá handhava, ið hevur fylt 75 ár ella meira verður broytt soleiðis, at gildistíðin fyri koyrikortið verður 5 ár, uttan mun til aldur. Hetta vil siga, at tá ið ein hevur fylt 75 ár og skal endurnýggja sítt koyrikort til koyrikort í flokki 1, (stórt prutl, motorsúkkla. vanligur bilur og stórt viðfestiakfar til vanligan bil), hevur koyrikortið gildi í 5 ár. Kravda læknaváttanin, sum skal fylgja við í sambandi við endurnýggjan av koyrikortinum, verður varðveitt.

Ásetingin um, at landsstýrið kann áseta reglur um gildistíðina hjá koyrikortum, ið eru latin persónum, sum hava fylt 73 ár, verður broytt. Við broytingini kann landsstýrismaðurin áseta reglur um gildistíðina fyri tey, sum hava fylt 73 ár, men ikki 75 ár.

Reglan um, at landsstýrið kann áseta styttri gildistíð hjá koyrikortum, um umstøður eru til tess, verður framvegis galdandi.

Til nr. 2: Gjaldið á 150 kr. fyri endurnýggjan av koyrikorti hjá umsøkjarum, sum hava fylt 75 ár, verður strikað.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Lógin kemur í gildi 1. januar 2019.

**Á Løgtingi, 21. august 2018**

Kári P. Højgaard Jógvan Skorheim

**Fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Hoyringarskriv frá Landsfelag Pensjónista